# Løgmaður helt lítið um hernaðarfrágreiðingina

*Danska stjórnin avsannar, at hon hevur havt fíggjarligan vinning av hernaðarliga virkseminum í Føroyum. Løgmaður heldur lítið um frágreiðingina, sum stjórnin gav á fundinum hósdagin*

*Eyðun Klakstein*
*Keypmannhavn*

Danska stjórnin avsannar nú, at hon hevur havt nakran sum helst vinning av hernaðarliga virkseminum í Føroyum.

Hóast forsætisráðharrin hevði noktað fyri at taka hernaðarmál við á dagskránna fyri samráðingarfundin hesaferð, kom hann - soleiðis sum Sosialurin kundi greiða frá í blaðnum í gjár - við eini frágreiðing kortini.

Men Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevði eftir samráðingarfundin einki gott at bera hesi frágreiðing, sum hann helt verða eitt skot við síðuna av.

Danska stjórnin heldur, at gongdin í málinum er skeiv, tí Danmark er ikki sloppið undan nøkrum kravi frá NATO um at skulu brúka 3% av bruttutjóðarúrtøkuni (BTÚ) til verjumál.

Í 1978 gjørdu NATO-limalondini eina semju um, at londini skuldu leggja seg eftir at brúka 3% av til verjumál, men fleiri lond hava ongantíð nátt hesum máli. Danmark er eitt av hesum londum, tí síðani 1976 hevur Danmark brúkt 2,6% av BTÚ til verjumál, og tað er væl niðanfyri tað, sum NATO-londini helst skulu brúka.

Landsstýrið heldur, at Danmark er sloppið bíligari í verjuútreiðslum, tí teir hava brúkt Føroyar og Grønland sum ein part av gjaldinum, men hesum afturvísir stjórnin.

**Vánalig frágreiðing**

Landsstýrið hevur roknað seg fram til, at Danmark hevur spart eini 30 milliardir krónur í verjuútreiðslum, tí NATO er sloppið at hava eina støð í Føroyum.



Hesa útrokning hevur landsstýrið nýtt í samráðingunum við stjórnina fyri at vísa, at Føroyar ikki bara hava tikið ímóti pengum, men at Danmark eisini hevur havt fíggjarliga fyrimun av Føroyum.

Danska stjórnin førir fram, at Føroyar hava notið vesturlendska verju uttan at gjalda fyri hesa. Allar útreiðslurnar til verjumál í Føroyum eru goldnar av danska statskassanum, og harafturat hava Føroyar fingið pengar burtur úr, at fólk við tilknýti til NATO og donsku verjuna hava verið í Føroyum.

Tí heldur stjórnin ikki, at hon skyldar Føroyum nakað orsaka av hernaðarligum viðurskiftum.

- Verjumál eru danskt málsøki, og tí eru tað eisini teir, sum skulu gjalda fyri hetta. Vit eru heldur ongantíð eftirspurdir í hernaðarmálum, og tað burturvið at siga, at vit hava spart pengar á hesum økinum, sigur Anfinn Kallsberg.

- Vit hava kanska fingið nakrar skattakrónur burtur úr teimum fólkunum, sum hava havt tilknýti til støðirnar í Føroyum, men tað ber ikki til at siga, at vit eru sloppin undan verjuútreiðslum, tí hetta málsøki er danskt.

**Skulu gera verjupolitikk**

Løgmaður sigur seg ikki kunna prógva, at danir hava havt fíggjarligan fyrimun av at brúka Føroyar í hernaðarligum viðurskiftum, men tað er nógv, sum bendir á tað. Danskir ráðharrar hava eisini áður nevnt, at Danmark er sloppið bíligari í verjuútreiðslum, tí tað hevur brúkt Føroyar og Grønland sum part av gjaldinum.

Løgmaður væntar, at danska stjórnin fer at koma við fleiri upplýsingum um hernaðarmálið.

Ein onnur orsøk til, at landsstýrið undan samráðingunum hósdagin kravdi at fáa hernaðarmál við á dagsskránna er, at landsstýrið vil hava upplýsingar um hernaðarliga týdningin hjá Føroyum - bæði fyrr og nú - so landsstýrið er ført fyri at gera ein verjupolitikk.

Á fundinum hósdagin segði Poul Nyrup Rasmussen við landsstýrið, at danska stjórnin fer ikki at viðgera føroyska verjupolitikkin, fyrr enn eitt ítøkiligt uppskot um hetta er komið frá landsstýrinum.

Landsstýrið sigur seg ikki kunna gera nakað uppskot fyrr enn tað hevur fingið fleiri upplýsingar um verjumálini.






## Føroyska kravið er burturvið

*Danskur professari í búskapi heldur, at føroyska ynskið um eina skiftistíð í 15 er fullkomiliga órímuligt*

*Eyðun Klakstein*

Martin Paldam, professari í búskapi við universitetið í Århus, heldur, at at føroyska ynskið um eina langa búskaparliga skiftistíð er burturvið.

- Eg skilji als ikki, at stjórnin ikki fyri langari tíð síðani hevur sagt, at blokkstuðulin má minka, sjálvt um Føroyar ikki taka fullveldi. Tað er eingin meining í, at Føroyar skulu hava 1,5 milliard krónur hvørt ár, sigur Paldam, sum hevur arbeitt nógv við føroyska búskapinum.

Hann heldur, at føroyingar skuldu hugsa um, hvussu onnur lond hava fingið fullveldi. Í afrikansku londunum fekk fólkið loyvið at vinda flaggið á stong, og so rýmdu bretarnir.

Paldam hevur heldur ikki nógv til yvirs fyri uppskotinum um at mótrokna møguligar oljuinntøkur í blokkstuðlinum.

- Nú hava vit givið Føroyum so nógvar pengar í so nógv ár, at tað hevði verið natúrligt, at føroyingar góvu okkum ein part av oljumilliónum, sjálvt um teir ikki taka fullveldi, segði bersøgni professarin við Ritzau í gjár.



# Antin fólkaatkvøðu ella nývál

*Formaðurin í Sambandsflokkinum heldur, at nú eru bert tvinnir kostir hjá landsstýrinum í at velja*

*Eyðun Klakstein*

- Antin fer landsstýrið til fólkaatkvøðu við tí samráðingarúrsliti, teir hava nátt, ella mugu teir leggja frá sær og skriva út nývál.

Soleiðis sigur formaðurin í Sambandsflokkinum, Edmund Joensen, eftir triðja samráðingarumfarið millum landsstýrið og stjórnina.

- Fullveldissamráðingarnar hjá landsstýrinum eru fullkomiliga miseydnaðar. Føroyar fáa fullveldi, um vit vilja tað, men danir hava alla tíðina gjørt greitt, at tað fer at kosta, og soleiðis er støðan framvegis.

Edmund Joensen heldur, at politisku fylgjurnar av miseyndaðu samráðingunum má vera, at teir flokkarnir, sum ætla at nýtmótans gera ríkisfelagsskapin mugu sleppa fram at. Formaður Sambandsfloksins hugsar við hesum um sín egna flokk og Javnaðarflokkin, sum eisini hevur mælt til eina nýggja skipan innan fyri ríkisfelagsskapin.

- Landsstýrið heldur fram við at siga, at teir vóna at koma til eitt betri samráðingarúrslit, men tað fer einki at broytast í framtíðini. Danir hava gjørt greitt, hvat fullveldi kostar. Tað sigur seg sjálvt, at teir ikki vilja lata føroyingum fullveldi og samstundis skula gjalda føroyingum stuðul ár eftir ár.

**Álitið á føroyingar rýkur**

Edmund Joensen heldur, at tað er púra burturvið at draga møguligar oljuinntøkur inn í fullveldissamráðingarnar.

- Landsstýrið ætlar at taka fullveldi við at seta oljuna og eftirkomarnar í veð, men tað var ein seinasta desperata royndin at eina betri skiftistíð. Og tann royndin miseydnaðist eisini, sigur hann.

Edmund Joensen heldur, at tað einasta landsstýrið fær burtur úr samráðingunum, er, at álitið á føroyingar verður niðurbrotið.

- Landsstýrið hevur gjørt stóran skaða fyri føroyingar við at ákæra danir fyri bæði líkt og ólíkt, og nú ætla teir eisini at venda sær til ST fyri at kæra Danmark. Hetta líkist ongum, sigur ein avgjørdur formaður fyri Sambandsflokkin.

Hann finnist eisini harðliga at løgmanni, sum førdi fram, at aðrastaðni verða slík mál loyst við krúti og kúlum.

- Tað má vera eindømi í søguni, at leiðarin í einum landi hóttir við krúti og kúlum fyri at sleppa at lækka livistøðið hjá sínum fólki niður í eina helvt, sigur Edmund Joensen.

# Stjórnin segði kortanei til oljuna

*Nýggja uppskotið hjá landsstýrinum um ein búskaparliga skiftistíð varð sópað til viks av donsku stjórnini. Nyrup vildi ikki hoyra talan um oljumilliónir úr Føroyum*

*Eyðun Klakstein úr*
*Keypmannahavn*

Landsstýrið fekk ikki donsku stjórnina at bíta á nýggja agnið, sum føroyska sendinevndin hevði við á fundin í Keypmannahavn hósdagin.

Undan triðja samráðingarumfarinum hevði landsstýrið gjørt eitt nýtt uppskot um búskaparliga skiftistíð, har møguligar oljuinntøkur skulu mótroknast í blokkstuðlinum.

Uppskotið, sum skuldi tryggja føroyingum eina betri skiftistíð, var fyrstu ferð lagt fyri donsku stjórnina á samráðingarfundinum hósdagin.

Donsku embætismenninir høvdu als ikki hoyrt um nýggja uppskotið frammanundan, og tá ein av embætismonnunum kom út úr samráðingarhølunum og varð spurdur um, hvat hann helt um nýggja uppskotið, stóð hann spyrjandi. Hann hevði als ikki hoyrt um uppskotið, men fekk tað síðani frá einum av donsku fjølmiðlafólkunum.

**Stjórnin stóð fast við sítt**

Nýggja uppskotið hjá landsstýrinum mælti til, at blokkstuðulin skal minka stigvíst í 15 ár. Um Føroyar fáa stórar oljuinntøkur innan hesin 15 árini, skal tann stuðulin, sum er latin eftir tey fýra árini, metast sum eitt lán, sum skal gjaldast aftur.

- Uppskotið hjá landsstýrinum vil bæði við og uttan oljuinntøkur hava við sær stórar sparingar fyri statskassan, sigur landsstýrið í viðmerkingunum til uppskotið.

Men landsstýrið fekk onga undirtøku fyri nýggja uppskotinum hjá sær. Danska stjórnin vildi ikki hoyra talan um at taka oljuna við í búskaparligu skiftistíðina.

- Vit halda ikki, at tað er rætt at blanda oljuna upp í hesar samráðingar, segði Poul Nyrup Rasmussen á tíðindafundinum eftir samráðingarnar.

- Vit hava sagt í eitt hálvt ár, at skiftistíðin verður ikki longri enn fýra ár, og tað halda vit fast við. Vit kunnu ikki gera nakað annað mótvegis danska fólkinum og flokkunum í Fólkatinginum, sigur danski forsætisráðharrin.

**Vildu vísa vilja**

Tá Anfinn Kallsberg, løgmaður, á tíðindafundinum varð spurdur um, hví landsstýrið nú hevði tikið oljuna við í samráðingarnar, svaraði hann, at landsstýrið royndi at vísa tann neyðuga viljan og fleksibilitetin til at koma víðari í samráðingunum um skiftistíðina.

Men í samráðingaruppleggingum, sum danska stjórnin fór á fundin við, varð gjørt greitt, at stjórnin ikki vildi taka undir við eini skiftisskipan, sum var tengd at gongdini í føroyska búskapinum.

- Hetta hevði verið í stríð við prinsippið um, at fullveldi og búskaparlig ábyrgd fylgjast, segði stjórnin á fundinum við landsstýrið.

Og við greiða boðskapinum hjá Nyrup og hansara fólkið varð nýggja uppskotið hjá landsstýrinum sópað til viks, áðrenn nakrar veruligar samráðingar komu í lag um tað.

Danska stjórnin stendur sostatt rimmarfast við tað, sum hon áður hevur sagt um skiftistíðina. Hon verður í mesta lagi fýra ár og verður ikki tengd at gongdini í føroyska búskapinum.


Vit víðka ferðaætlanina
- við Føroyum sum miðdepli




14 ferðir til Keypmannahavnar
5 ferðir til Íslands Reykjavík
3 ferðir til Skotlands 2 x Aberdeen 1 x Glasgow
2 ferðir til Noregs Stavanger
3 ferðir til Jútlands 2 x Billund 1 x Århur
- hvørja viku!

Atlantic Airways
Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo